AR7

Umsóknarblað

ÚTLENDINGASTOVAN

IMMIGRATION OFFICE

AR7_fo_010924

# Umsókn um undangóðkenning av føroyskum arbeiðsgevara til at seta í starv ES-ríkisborgarar

**Hvat kanst tú brúka hetta umsóknarblaðið til?**
Føroyskir arbeiðsgevarar, sum vilja hava undangóðkenning, kunnu brúka hetta umsóknarblaðið til at seta í starv arbeiðstakarar, sum eru ríkisborgarar í landi, sum er limur í ES.

Ein undangóðkenning merkir, at tú sum arbeiðsgevari fært rætt til at seta arbeiðstakarar, sum eru ES ríkisborgarar. Ein arbeiðstakari kann tó ikki byrja at arbeiða hjá tær, fyrr enn tey ítøkiligu setanarviðurskiftini eru fráboðað Útlendingastovuni.

Undangóðkenningin snýr seg um eina serliga skipan av uppihaldsloyvum fyri at fáa ES-ríkisborgarar í arbeiði í Føroyum. Uppihaldsloyvið verður latið, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum er undir 3,5%. Innan byggi- og verklagsarbeiði verður uppihaldsloyvið latið teimum faklærdu innan ávís handverk, um arbeiðsloysi har er undir 6%.

Tú skalt vera varur við, at skipanin dettur burtur, um arbeiðsloysið í Føroyum fer upp um ávikavist 3,5 og 6% í tríggjar fylgjandi mánaðar.

Ein undangóðkenning er galdandi í 1 ár eftir, at hon er útskrivað. Ætlar tú at nýta hesa góðkenning longur enn eitt ár, skalt tú søkja um leingjan.

**Hvør kann fáa undangóðkenning?**
Fyri at tú sum føroyskur arbeiðsgevari kanst fáa undangóðkenning, skalt tú
- vera búsitandi í Føroyum
- vera fevndur av einum felags føroyskum sáttmála um lønar- og arbeiðsviðurskifti.
- vera skrásettur hjá TAKS við ávísingarskyldu eftir føroysku skattalógini.

Sum arbeiðsgevari mást tú harafturat ikki vera uppi í nakrari lógligari arbeiðtrætu.

**Hvat kanst tú brúka undangóðkenningina til?**
Við einari undangóðkenning hevur tú rætt til at seta ein ES-ríkisborgara í starv, sum er í minsta lagi 30 vanligar arbeiðstímar. Tað er krav, at arbeiðið er innan fyri sáttmálan, tú ert fevndur av. Tað er harafturat krav, at minsta lønin ikki er minni enn minsta lønin fyri tilsvarandi arbeiði hjá einum føroyskum fakfelag.

Tú kanst eisini fáa undangóðkenning at seta serfrøðingar, granskarar, undirvísarar og leiðandi starvsfólk í starv, har lønar- og setanarviðurskiftini eru lagað eftir sáttmála fyri tann einstaka. Hetta skalt tú søkja um fyri seg undir parti 4 niðanfyri.

**Soleiðis gert tú**
1. Fyll út og skriva undir hetta umsóknarblaðið. Fylg leiðbeiningunum í blaðnum
2. Legg neyðugu skjølini við
3. Send umsóknarblaðið til info@utlendingastovan.fo ella sum vanligan post til Útlendingastovuna, Skálatrøð 20, Postrúm 264, FO-110 Tórshavn. Tú kanst eisini lata umsóknarblaðið inn til politiið í Føroyum.

**Hvørji skjøl leggur tú við umsóknini?**
Tú verður biðin um at leggja hesi skjøl við:
- Skjalprógv fyri, at tú sum arbeiðsgevari hevur gjørt ein føroyskan sáttmála (avrit av skjalprógvi um limaskap í einum føroyskum arbeiðsgevarafelag ella avrit av eini galdandi avtalu at taka undir við einum sáttmála). Tað skal síggjast í skjalpróvnum, hvør sáttmáli er gjørdur.
- Skjalprógv fyri, at virkið er grundfest í Føroyum
- Skjalprógv fyri, at virkið er skrásett hjá TAKS við ávísingarskyldu eftir føroysku skattalógini

**Nær kann arbeiðstakarin byrja at arbeiða?**
Áðrenn ein arbeiðstakari kann byrja at arbeiða, skalt
- tú sum arbeiðsgevari hava fingið tína undangóðkenning, og
- tú og arbeiðstakarin hava boðað Útlendingastovuni frá ítøkiligu arbeiðsviðurskiftunum.

Boðað frá arbeiðsviðurskiftum verður gjørt við at brúka eitt serligt umsóknarskjal (umsóknarblað AR8).

Um arbeiðstakari byrjar at arbeiða, áðrenn Útlendingastovan hevur fingið boð um setanina, arbeiðir hann/hon ólógliga, og bæði tú sum arbeiðgevari og arbeiðstakarin kunnu verða revsað við bót ella fongsli.

**Um tú vilt vita meira**
Tú kanst fáa fleiri upplýsingar um reglarnar fyri uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum til ES-ríkisborgarar á utlendingastovan.fo. Her kanst tú eisini fáa fleiri upplýsingar um málsviðgerðartíðina. Um tú ivast, kanst tú seta teg í samband við Útlendingastovuna og fáa vegleiðing um reglarnar. Tú finnur upplýsingar um samband við okkum á www.utlendingastovan.fo/um-okkum.

**Til myndugleikarnar**

| Tikið ímóti dagfesting | Tikið ímóti hevur (stempul og navn) |
|---|---|
| | |

## 1. Upplýsingar um arbeiðsgevara (virki)

**FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM**

| Arbeiðsgevari/navn á virki | Arbeiðsgevari V-tal: |
|---|---|
| Arbeiðsgevari, bústaður (gøta og nr.) | |
| Postnr. og býur | Kommunan, har arbeiðsplássið er |
| Kontaktpersónur | |
| Telefonnr. | Teldupostur |

## 2. Upplýsingar um vinnugrein

Hvørja vinnugrein hoyrir virkið hjá arbeiðsgevaranum undir?

(Set bara *ein* kross)

- ☐ Bilasøla, service og bensinstøð
- ☐ Byggi og verklag
- ☐ Smásøla og umvælingar, men ikki bilar
- ☐ Orku- og vatnveiting
- ☐ Heilsøla, men ikki bilar
- ☐ Fígging og trygging
- ☐ Fiskiskapur
- ☐ Feløg, mentan og burturkast
- ☐ Handilstænasta
- ☐ Føði-, drikki- og tubbaksvøruídnaður
- ☐ Hotell og matstovur
- ☐ Jarn- og metalídnaður
- ☐ Evnafrøðiligur ídnaður og plastídnaður
- ☐ Landbúnaður, gartnarí og skógbúnaður
- ☐ Møblaídnaður og annar ídnaður
- ☐ Almenn fyrisiting
- ☐ Postur og fjarskifti
- ☐ Útvinnan av ráevni
- ☐ Sosialir stovnar
- ☐ Stein-, leirs- og glasídnaður
- ☐ Heilsuverk
- ☐ Klædna- og leðurídnaður
- ☐ Flutningur
- ☐ Træ-, pappírs- og grafiskur ídnaður
- ☐ Útleigan og ognarmiðlan
- ☐ Undirvísing

## 3. Upplýsingar um sáttmálalig viðurskifti

**FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM**

Er arbeiðsgevarin fevndur av galdandi sáttmála? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, upplýs um sáttmálarnar, arbeiðgevarin hevur gjørt umvegis Arbeiðsgevarafelagið

______________________________________________________________________________

Er arbeiðsgevarin limur í Arbeiðsgevarafelagnum? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, skal skjalprógv leggjast við

______________________________________________________________________________

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## 4. Undangóðkenning til setan av serfrøðingum, granskarum, undirvísarum og leiðandi starvsfólkum

**FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM**

**Undangóðkenning til setan av serfrøðingum o.ø.**
Um arbeiðsgevarin lýkur vanligu krøvini (sí omanfyri undir "Hvør kann fáa undangóðkenning") til undangóðkenning, ber eisini til at geva undangóðkenning at seta serfrøðingar, granskarar, undirvísarar og leiðandi starvsfólk, har lønar- og setanarviðurskifti verða skipað í sáttmála við tann einstaka.

Legg til merkis, at ein undangóðkenning bara er galdandi fyri setanarviðurskifti innan fyri teir setanarbólkar, sum arbeiðsgevarin hevur upplýst um niðanfyri.

**Serfrøðingar**
Serfrøðingar eru starvsfólk, sum eru í serfrøðingastørvum, sum ikki eru partur av ovastu leiðsluni, undir hesum t.d. verkfrøðingar, arkitektar, búskaparfrøðingar, løgfrøðingar, læknar, djóralæknar, tannlæknar, fysioterapeutar, sjúkrarøktafrøðingar, journalistar, tøkniligir og løgfrøðiligir ráðgevarar.

**Granskarar**
Granskarar eru starvsfólk, sum í starvi á fróðskaparsetrum, hægri lærustovnum ella privatum virkjum starvast við gransking, undir hesum professorar, granskingarprofessorar, lektarar, adjunktar, stipendiatar, ph.d.-granskarar, granskingarleiðarar, granskingarstarvsfólk, granskingarhjálparfólk, granskarar og vísindafólk

**Undirvísarar**
Undirvísarar eru starvsfólk, sum í starvi sínum á fróðskaparsetrum ella á hægri lærustovnum starvast við undirvísing, undir hesum professorar, gestaprofessorar, seniorlektorar, lektorar, adjunktar, stipendiatar, ph.d.-lesandi og hjálparfólk hjá undirvísarum.

**Leiðandi starvsfólk**
Leiðandi starvsfólk eru stjórar, fyristøðufólk og leiðandi teknisk ella fyrisitingarlig starvsfólk, sum hoyra til ovastu leiðsluna, undir hesum fyrsitingarstjórar, tekniskir stjórar, søluleiðarar, innkeypsleiðarar, innflutningsleiðarar, marknaðarleiðarar, starvsfólkaleiðarar, leiðandi verkfrøðingar, verkfrøðingaleiðarar, arkitektaleiðarar

Vilt tú hava undangóðkenning at seta serfrøðingar, granskarar, undirvísarar eller leiðandi starvsfólk? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, verður tú biðin at kunna um:

| Arbeiðsøki | Sløg av starvi |
|---|---|
| | |

## 5. Váttanir

**A. Váttan við trú og heiður, at eg havi givið rættar upplýsingar**
Eg vátti, at eg havi skrivað rættar upplýsingar i hetta umsóknarblað.

Um upplýsingarnar ikki eru rættar, kann tað hava hesar fylgjur:

- Eg kann verða revsað/ur við bót ella fongsul upp til 4 mánaðar
- Eg kann verða dømd/ur at gjalda aftur útreiðslur, sum føroyskir myndugleikar hava havt av skeivu upplýsingunum

**B. Kunning um, at arbeiðsgevari kann verða revsaður, um arbeiðstakarin arbeiðir ólógliga**
Um ein útlendskur arbeiðstakari arbeiðir ólógliga í Føroyum, t.v.s. uttan neyðug loyvir ella í stríð við fastsettu treytirnar í loyvinum, kanst tú sum arbeiðsgevari verða revsaður við bót ella fongsli upp til 1 ár.

**C. Kunning um, at tær kann verða álagt at geva neyðugar upplýsingar**
Tær kann vera álagt at koma við teimum upplýsingum, sum eru neyðugir fyri at gera av, um umsøkjari kann fáa eitt loyvi. Um tú ikki kemur við hesum upplýsingum, kann tað merkja, at umsøkjarin einki loyvi fær.

**D. Kunning um viðgerð av persónupplýsingum um umboð**
Útlendingastovan hevur skyldu at upplýsa teg um, hvussu vit viðgera tínar upplýsingar (tá ið tú ert umboð ella eigur eitt einstaklingsvirki), og hvørji rættindi, tú hevur í mun til okkara viðgerð av tínum upplýsingum.

**Dátuábyrgdari**
Útlendingastovan hevur dátuábyrgd av viðgerðini av teimum persónsupplýsingum, sum verða fingnar um teg í hesum umsóknarblaði og teimum upplýsingum, sum verða fingnar um teg í sambandi við viðgerðina av málinum. Tú kanst seta teg í samband við Útlendingastovuna við at skriva til henda bústað, Útlendingastovan, Skálatrøð 20, Postrúm 264, FO-110 Tórshavn, ella umvegis utlendingastovan.fo/um-okkum.

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

**Dátuverndarfólk (DPO)**
Tú kanst seta teg í samband við dátuverndarfólk okkara á teldupostadressu dpo@vs.fo ella á telefon +298 356020. Tú kanst lesa meira um Útlendingastovuna sum datuábyrgdara og um dátuverdarfólk okkara á utlendingastovan.fo/um-okkum/datuvernd.

**Endamál og rættarstøði**
Persónupplýsingarnar, tú letur Útlendingastovuni, verða savnaðar at brúka til:
- viðgerð av hesi umsókn um undangóðkenning
- eftirlit

Rættarstøðið undir viðgerðini av tínum persónsupplýsingum er:
- Anordning om ikrafttræden af udlændingeloven for Færøerne (Útlendingalógin galdandi fyri Føroyar), serliga kapittul 1 um innferð hjá útlendingum og uppihald í landinum.
- Lov nr. 462 fra 17. juni 2008 for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse (Skipan fyri ES ríkisborgarar).
- Grein 8, stk. 1, nr. 3, í dátuverndarlógini um rættarliga skyldu, sum liggur á tí við ábyrgd av dátum, og grein 8, stk. 1, nr. 5, um almenna myndugleikan, Útlendingastovan útinnir sambært útlendingalógini.
- Grein 12, stk. 7, í dátuverndarlógini, um neyðuga viðgerð fyri, at rættarkrøv skipast, gerast galdandi ella verjast.
- Grein 13 í dátuverndlógini um, at fyrisitingin bara kann viðgera upplýsingar um revsiverd viðurskifti, um tað er neyðugt fyri, at myndugleikarnir kunnu røkja sínar uppgávur.

Tær kann verða álagt at koma við teimum upplýsingum, sum eru neyðugar fyri at meta, um virkið kann fáa undangóðkenning.

Tær upplýsingar, sum tú gevur ella hevur givið í sambandi við umsóknina, fara at verða skrásettar í skráunum hjá Útlendingastovuni.

**Vit viðgera hesi sløg av persónsupplýsingum um teg:**
- Vanligar upplýsingar, tað kunnu t.d. vera upplýsingar um navn títt, upplýsingar um samband og upplýsingar um starv títt á virkinum

**Vit kunnu lata persónsupplýsingar um teg til hesar móttakarar**
Útlendingastovan kann í ávísum førum lata tínar upplýsingar til onnur, og vit lata t.d. upplýsingar til løgregluna og til donsku útlendingamyndugleikarnar, Styrelsen for International Rekruttering og Integration og Udlændingestyrelsen.

**Hvaðani koma upplýsingarnar, vit viðgera um teg?**
Upplýsingarnar, ið Útlendingastovan viðgerð um teg, stava frá hesum umsóknarblaði. Vit viðgera eisini upplýsingar, sum tú seinni gevur málinum.

**Varðveitsla av upplýsingum**
Útlendingastovan varðveitir tínar persónsupplýsingar so leingi, tað er neyðugt fyri at kunna røkja okkara uppgávur í mun til at gera niðurstøðu um eitt rættarkrav/gera eitt rættarkrav galdandi ella verja eitt rættarkrav um uppihald. Um virkið søkir um uppihaldsloyvi til útlendingar, fara upplýsingarnar frá málinum um undangóðkenning bara at vera í tínum máli. Í einum máli um útlendingar, kunnu upplýsingar verða varðveittar til útlendingamyndugleikarnar at brúka í seinni málsviðgerðum. Tað vil siga, at upplýsingarnar kunnu vera partur í framtíðar málum, t.d. málum um leingjan, afturtøku, eftirlit, burturfall, varandi uppihald og ríkisborgaraskap. Í roynd og veru merkir tað, at Útlendingastovan varðveitir tínar upplýsingar í málunum hjá møguligum umsøkjarum í eitt sokallað lívsskeið – tað vil sig alt lívið.

At enda skulu vit nevna, at upplýsingarnar verða flýggjaðar Tjóðskjalasavninum sambært reglunum í føroysku lóggávuni um skjalasøvn.

**Rættindi**
Sambært lógini um dátuvernd hevur tú eina røð av rættindum í mun til, hvussu vit viðgerða upplýsingar um teg:

*Rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera*
Tú kanst biðja um innlit í, t.v.s. fáa at vita, hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera. Um tú biður um innlit í tínar upplýsingar, verður umsóknin viðgjørd eftir reglunum í lógini um vernd av dátum. Eru aðrar reglur, sum geva tær betri rætt, fara vit eisini at viðgera umsókn tína um innlit eftir teimum reglunum, t.d. reglurnar í fyrisitingarlógini um skjalainnlit.

*Rætt til at rætta og strika upplýsingar*
Tú kanst biðja um at sleppa at rætta upplýsingar um teg, sum tú heldur, ikki eru rættar. Í serligum førum hevur tú eisini rætt til at sleppa at strika upplýsingar um teg. Upplýsingar verða tó sum heild bara strikaðar, um tær ikki eru neyðugar til málsviðgerðina, tí Útlendingastovan hevur uppskrivingar- og skrásetingarskyldu eftir innlitslógini.

*Rætt til at avmarka viðgerð*
Tú hevur í ávísum føri rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at avmarkað viðgerðina, sleppa vit hereftir bara at viðgera upplýsingar – undantikið varðveitslu – við tínum samtykki ella við ætlan um at gera niðurstøðu um eitt rættarkrav, gera eitt rættarkrav galdandi ella verja eitt rættarkrav, ella fyri at verja eitt fólk ella týdningarmiklan samfelagsáhuga.

*Rætt til at mótmæla*
Í ávísum førum hevur tú rætt til at mótmæla okkara annars lógligu viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tað merkir, at tú møguliga kanst krevja, at upplýsingarnar verða strikaðar, rættaðar ella avmarkaðar.

Tú kanst lesa meira um tíni rættindi í vegleiðingini hjá Dátueftirlitinum um rættindini hjá teimum skrásettu á www.dat.fo. Ætlar tú at brúka tíni rættindi, skalt tú seta teg í samband við Útlendingastovuna.

**Kæra til Dátueftirlitið**
Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við mátan, vit viðgera tínar persónupplýsingar. Tú finnur upplýsingar um samband við Dátueftirlitið á www.dat.fo.

**D. Eftirlit**
Útlendingastovan kann kanna, um upplýsingarnar, tú hevur givið í sambandi við umsóknina, eru rættar. Tað kann bæði vera undir sjálvari viðgerðini av tíni umsókn og seinni, tá ið tú møguliga hevur fingið hana góðkenda.

Eftirlitið kann verða gjørt av øðrum myndugleikum.
Tú kanst í sambandi við eftirlit verða biðin um at senda fleiri upplýsingar.

## 6. Underskrift - arbeiðsgevari

**Eg vátti við mínari undirskrift, at eg havi lisið og góðtikið innihaldið av váttanum í pkt. 5 í parti A.**

**Eg havi eisini skilt, at tær upplýsingar, eg havi givið ella gevi, fara at verða varðveittar í skráunum hjá Útlendingastovuni.**

| Dagfesting og stað | Undirskrift |
|---|---|
| | |

## Hevur tú minst til alt?

Um umsóknin um undangóðkenning í Føroyum er rætt fylt út, og neyðugu skjølini eru løgd við, kann Útlendingastovan viðgerða málið skjótt.

Tí er týdningarmikið, at tú – áðrenn umsóknin verður latin inn – kannar, at oyðublaðið er rætt útfylt, og at neyðugu skjølini eru løgd við.

Vit mæla til, at tú nýtir minnislistan niðanfyri, áðrenn umsóknin um undangóðkenning verður latin inn.

## Minnislisti

**Áðrenn umsóknin verður latin inn, er týdningarmikið, at tú hevur lagt tað niðanfyri við (krossa av):**

☐ Skjalprógv fyri, at tú sum arbeiðsgevari ert fevndur av galdandi føroyskum sáttmálum við avriti av skjalprógvi fyri limaskapi í einum yrkisfelag

☐ Skjalprógv fyri, at virkið er stovnað í Føroyum

☐ Skjalprógv fyri, at virkið er skrásett hjá TAKS sum ávísingarskyldugt eftir føroysku skattalógini

**Tað er eisini týdningarmikið, at tú (arbeiðsgevari) hevur**

☐ svarað øllum spurningum og

☐ skrivað undir og og dagfest umsóknina undir pkt. 6.

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## Tilskilað myndugleikunum

### Viðmerkingar, eisini í sambandi við framsending

Løgd við eru:

☐ Skjalprógv fyri, at arbeiðsgevarin er fevndur av galdandi føroyskum sáttmála

☐ Skjalprógv fyri, at virkið er stovnað í Føroyum

☐ Skjalprógv fyri, at virkið er skrásett hjá TAKS sum ávísingarskyldugt eftir føroysku skattalógini

☐ Annað

Viðmerkingar

**MINST EISINI TIL AT FYLLA ÚT NØVN OG DAGFESTING AV MÓTTØKU Á SÍÐU 2**